Sunnukvøld kl. 20.40

Matador

Býráðsskrivarin er aftur komin sær í trupulleikar og Varnæs, bankastjóri, noyðist at viðganga, at ikki bert ein meginregla er galdani í veruliga lívinum. Ein ferðandi sjónleikarbólkur kemur til Korsbæk og ein teirra verður verandi í býnum. Hon vil broyta lív sítt.

... Og lívið gongur víðari í Korsbæk, so sum tað hevur gjørt 11 teir seinastu sunnudagarnar í Sjónvarp Føroya.

Kvinnan aftanfyri búnarnar

Annað fyribrigdi í Matador eru allir búnarnir, sum sýnast at sita so væl til søgugongdina og klædnabúnan, sum hann var í teirri tíðini.

Tað er kenda sjónleikarseymirskan Ulla-Britt Søderlund úr Svøriki, sum hevur seymað búnarnar í Matador.

Fyri at finna greiði á mótanum fyrr í tíðini, sum søgugongdin í Matador sigur frá, hevur hon granskað vikubløðini, — serliga Familjejournalen, Hjemmet og Mønstertidende.

Eisini dagbløðini Politiken og Østsjællands Folkeblad eru blaðað igjøgnum, fyri at fáa rætta dámin yvir búnarnar.

Ein partur av búnunum er kortini tikið burtur úr luftini. Tað eru búnarnir hjá Møhge og dóttrini. Tað kemst av, at møðgurnar eru serliga pírnar í klædnakeypi, — ikki minst skinur, tá talan er um atlaskes-kjólan hjá tí gomlu. Hann er umseymaður eini hundrað ferðir!

Fyri hvørja sending hevur Ulla-Britt Søderlund gjørt umleið 80 búnar, umframt búnar til eini 30—40 statistar, sum eru við í hvørji sending sær.

Bert búnarnir hjá møggunum í Matador, eru ikki skjalfastir. Her hevur Ulla-Britt Søderlund spælt sær, ti hon veit, at júst hesir persónar ikki nýttu pening til klæðir, — á sama hátt sum betra slagið í Korsbæk gjørdi í sini tíð

Ulla-Britt Søderlund, er víða kend — bæði í Europa og USA, fyri dugnaskap, tá tað snýr seg um at seyma búnar til sjónleikarar í filmi eins og á palli. Hon hevur eisini fingið heiðurstekin fyri arbeiði sítt

Sunnukvøld kl. 18.30

Dýrafilmur

Gerald og Lee Durell vitja í fimta parti í sendirøðini á La Camardue, sum er stað í Fraklandi. Náttúran her er hyljar og dýki, umgirt við sevrunnum, klettum og furutrøum. Áður gingu ross og onnur dýr á lendi her, men nú er vatnið veitt burtur og istaðin verður lendið nýtt til ris- og vindyrking.

Kortini hevur ein flokkur av villum hvitum rossum enn tilhaldsstað her.

Durrell hjúnini troka seg nærhendis dýrini í La Camardue og avdúka, hvussu tey bera seg at, tá tey fanga fuglar og súgdjór.

Serliga viðagitið er júst hetta økið fyri ljósareyðu flamingo dýrini. Tey eru eisini at siggja í sendingini í kvøld.

Sunnukvøld kl. 22.40

Áðrenn Grand Prix

Sendingin snýr seg um tónleikarbólkar og sangarar, sum skulu kappast í Grand Prix, tónleika- og sangkappingina innan popptónleik, fyrri partur varð sendur í farnu viku.

Í kvøld fara vinnararnir í Ísrael, Italia, Noregi, Bretlandi, Sveits, Luxembourg, Grikkalandi og Vesturtýsklandi at framføra sangin, sum hvørt land sær hevur valt at umboða seg í poppkappingini Grand Prix.

Sunnudag kl. 21.40

Hóast alt

Í triðja hvørjum skúlaflokki í Danmark situr ein næmingur, sum verður hildir at vera atferðartrupul ella seinførur — uttan at hetta veruliga er so. Tað veit kortini eingin, — hvørki foreldur ella lærarar.

Hesi børn hava eina fjalda sjúku, sum ger, at tey missa vitið eitt stutt tíðarbil, uttan at tað sæst á teimum.

Tað kann hava við sær, at t.d. lærarin spyr ein annars dugnaligan næming, hvussu høvuðsstaðurin í Danmark eitur.

Næmingurin veit ikki, hvat spurningur snúði seg um.

Um næmingurin nú heldur, at lærarin hevur spurt, hvønn lit viðarlundin hevur, svarar næmingurin »grønt«. Tá er avleiðingin, at allir skúlanæmingarnir í flokkinum fella í skellilátur.

Hetta er m.a. annað úrslit av fjaldu sjúkuni, sum verður tikin fram í ljósmála í sendingini. Vit hitta Anette úr Skagen.

PLÁTU PUB BARRIN Tlf. 13404

Landsins nógv størsta úrval av videofilmum.
Tygara egna.
Program 2.

VIDEO-BOND

2 árs garanti

3stk. 295,-

Vinarligast send mær:

☐ BETA 3.stk. 295,- ☐ VHS 3.stk. 295,-

Navn _____

Bústaður _____

Postnr./bygd _____

LM-handilin
Vit gera hvat vit kunna — og kunna tað vit gera! Tlf. 11220 Sølumiðstøðin